J.NR.

# Broytingar í arbeiðstíð

## í sambandi við lønarískoyti (korona)
## tíðarskeiðið 24. august – 31. august

### Vegleiðing

Arbeiðsgevari hevur skyldu til alt fyri eitt at boða ALS frá, um broytingar eru í arbeiðslutfallinum hjá starvsfólkinum í mun til tað, sum upplýst var í umsóknini um lønarískoyti (korona).

Lønarískoytið verður útgoldið 14. hvønn dag, og arbeiðsgevarin fráboðar ALS broytingar í arbeiðslutfallinum fyri tíðarskeiðið seinastu 14 dagarnar. Fráboðanin skal latast ALS í seinasta lagi **mánadagin 7. september kl. 08.00.**

Verður boðað frá broytingum seinni enn hetta, koma broytingarnar ikki við í komandi útgjaldinum og verða tí tiknar við í næsta útgjaldinum, sum verður tvær vikur seinni. Verður ov nógv útgoldið í lønarískoyti av órøttum, kann tað verða kravt inn aftur antin frá starvsfólkinum ella frá arbeiðsgevaranum.

Hevur ella fær starvsfólkið rætt til sjúkradagpening undir sjúku ella er starvsfólkið sett ella mælt til at fara í sóttarhald orsakað av COVID-19, skal arbeiðsgevarin alt fyri eitt boða Arbeiðsloysisskipanini frá hesum. Upplýsingar um broytingar í setanarviðurskiftunum ávirka útgjaldið av lønarískoyti, sum verður útgoldið 14. hvønn dag og skal tí fráboðast beinanvegin.

ALS hevur heimild til at útvega allar neyðugar upplýsingar um viðurskifti hjá arbeiðsgevara og starvsfólki, herundir eisini upplýsingar frá TAKS.

Um tú sum arbeiðsgevari letur ALS skeivar upplýsingar ella tegir um umstøður av týdningi fyri rættindi hjá starvsfólki tínum til lønarískoyti, kunnu upphæddir, sum av órøttum eru útgoldnar, verða kravdar afturgoldnar antin frá starvsfólkinum ella frá tær sum arbeiðsgevara.

Somuleiðis kanst tú sum arbeiðsgevari verða revsað/-ur við sekt ella hefti.

**Send við telduposti til als@als.fo**

**GG! Minnist til at goyma pdf-skjalið, áðrenn sent verður til Arbeiðsloysisskipanina.**

### 1 Arbeiðsgevari

| | | |
|---|---|---|
| Navn | | Tel |
| Gøtunavn og húsanummar | | |
| Postsmoga | Postnr. | Býur/bygd |
| Kontaktpersónur | | Fartel |
| Teldupostur | | |
| V-tal | | |

Arbeiðsloysisskipanin
Tinghúsvegur 14 · Postsmoga 3022 · 110 Tórshavn
Tel 349550 · als@als.fo · www.als.fo

ALS

## 2 Upplýsingar um starvsfólkið

| | | |
|---|---|---|
| Føðingardagur og p-tal | | Fartel |
| Navn | | |
| Gøtunavn og húsanummar | | |
| Postsmoga | Postnr. | Býur/bygd |
| Teldupostur | | |

## 3 Broyting í arbeiðstíð hjá starvsfólkinum

| | |
|---|---|
| **Broyttur starvsbrøkur**<br>Er starvsbrøkurin broyttur í mun til tað, sum upprunaliga søkt var um? | JA ☐ NEI ☐ |
| Um ja, frá nær (dagfesting)? | |
| Er starvsfólkið farið at arbeiða sama starvsbrøk, sum áðrenn tað var sent heim? | JA ☐ NEI ☐ |
| Um starvsfólkið ikki er farið í sama starvsbrøk, hvør er nýggi niðursetti starvsbrøkurin? | |
| **Arbeiddir tímar**<br>Er arbeidda tímatalið broytt í mun til upprunaliga upplýsta starvsbrøkin/tímatalið? | JA ☐ NEI ☐ |
| Um ja, hvussu nógvar tímar hevur starvsfólkið arbeitt meiri ella minni enn upplýsta starvsbrøkin í tíðarskeiðnum 24. august – 31. august? | |

## 4 Viðmerkingar

## 5 Váttan

Undirritaði privati arbeiðsgevari bindi meg við hesum at geva ALS boð um allar broytingar í viðurskiftum hjá starvsfólki í starvi hjá mær viðvíkjandi omanfyri nevndu spurningum og annars um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri útgjaldið av lønarískoyti frá ALS til míni starvsfólk.

Upplýsingarnar, latnar í umsóknarblaðnum, kunnu kannast av eftirlitinum hjá ALS við heimild í § 27 í Ll nr. 113 frá 13. juni 1997 við seinni broytingum.

☐ Eg vátti við trúnaðartreytum at hava lisið leiðbeiningina á síðu 1, og at allar upplýsingar, sum eru latnar ALS í hesum umsóknarblaði, eru sannar.

Dagfesting

**Send við telduposti til als@als.fo**

**GG! Minnist til at goyma pdf-skjalið, áðrenn sent verður til Arbeiðsloysisskipanina.**

Umhvørvis- og vinnumálaráðið

**Kunngerð**
**um**
**útgjald til persónar, sum eru í starvi hjá arbeiðsgevara á privata arbeiðsmarknaðinum, sum eru heimsendir av arbeiðsgevara orsakað av COVID-19**

Við heimild í § 14 a, stk. 4 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 2020 og í samráð við stýrið fyri ALS, verður ásett:

*Fevnd*

**§ 1.** Fevndir av hesi kunngerð eru arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum, sum senda starvsfólk heim orsakað av COVID-19, og tey starvsfólk, sum hesir arbeiðsgevarar senda heim av somu orsøk.
*Stk. 2.* Tað er ein treyt, at starvsfólkið framhaldandi er í starvi hjá arbeiðsgevaranum, hóast arbeiðsskyldan heldur uppat heilt ella partvíst.

*Rætt til lønarískoyti*

**§ 2.** Rætt til lønarískoyti hevur persónur, sum:
1) er í starvi hjá privatum arbeiðsgevara,
2) av arbeiðsgevaranum er sendur heim heilt ella partvíst orsakað av COVID-19,
3) hevur fylt 16 ár, men ikki 67 ár, og
4) hevur bústað í Føroyum.

*Umsókn o.a.*

**§ 3.** Fyri at starvsfólkið skal koma undir hesa skipan, skal arbeiðsgevarin fylla út og senda Arbeiðsloysisskipanini eitt av Arbeiðsloysisskipanini tilevnað umsóknarblað soleiðis, at tað er Arbeiðsloysisskipanini í hendi í seinasta lagi 7 dagar eftir, at arbeiðsgevarin hevur sent starvsfólkið heim.
*Stk. 2.* Starvsfólkið hevur skyldu til at fara til arbeiðis eftir tørvi og boðum arbeiðsgevarans. Arbeiðsgevarin boðar Arbeiðsloysisskipanini frá broytingum í arbeiðsskylduni hjá starvsfólkinum.
*Stk. 3.* Arbeiðsloysisskipanin kann krevja, at starvsfólkið við sínari undirskrift váttar, at upplýsingarnar, sum eru í umsóknarblaðnum, eru rættar.

**Send við telduposti til als@als.fo**

**GG! Minnist til at goyma pdf-skjalið, áðrenn sent verður til Arbeiðsloysisskipanina.**

*Stk. 4.* Í serligum førum kann Arbeiðsloysisskipanin víkja frá freistini í stk. 1.

*Avgreiðsla og útgjald*

**§ 4.** Lønaríškoytið sambært hesi kunngerð er 115,38 krónur um tíman fyri í mesta lagi 40 tímar um vikuna. Ískoytið verður veitt í sama lutfalli, sum arbeiðsskyldan minkar.
*Stk. 2.* Ískoytið til lønina verður útgoldið eftir hvørt útgjaldsskeið, ásett av Arbeiðsloysisskipanini. Eitt útgjaldsskeið fevnir um 14 álmanakkadagar og 10 útgjaldsdagar svarandi til tvær arbeiðsvikur.
*Stk. 3.* Ískoytið til lønina verður, eftir vanligu reglunum í skattalógini um útgjald av A-inntøkum, ávíst starvsfólkinum eftir hvørt útgjaldsskeið, við tí freist, Arbeiðsloysisskipanin hevur fyri neyðini til at avgreiða útgjaldið.

*Onnur inntøka*

**§ 5.** Lønaríškoytið kann verða skert við øðrum A-inntøkum frá arbeiði, sum starvsfólkið ikki hevði, tá tað var heimsent av sínum arbeiðsgevara, og sum eru innvunnar í útgjaldsskeiðinum.
*Stk. 2.* Aðrar A-inntøkur skulu upplýsast fyri Arbeiðsloysisskipanini.
*Stk. 3.* Hevur ella fær starvsfólkið rætt til sjúkradagpening undir sjúku, skal viðkomandi alt fyri eitt boða Arbeiðsloysisskipanini frá hesum, og lønaríškoytið verður skert við sjúkradagpeninginum.
*Stk. 4.* Aðrar A-inntøkur sambært stk. 1 verða umroknaðar til tímar, í hesi kunngerð nevndir arbeiðstímar, sum lønaríškoyti ikki verður goldið fyri. Arbeiðstímarnir verða roknaðir sum vunna A-inntøkan í útgjaldsskeiðinum, býtt við 132,69.
*Stk. 5.* Um tíðarskeiðið, starvsfólkið hevur arbeitt í einum stuðulstíðarskeiði, er longri enn talið av arbeiðstímum, sum verða roknaðir sambært stk. 4, verður lønaríškoytið tó ikki goldið fyri hetta tíðarskeið.

*Gildiskoma*

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 12. mars 2020.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, dagfesting

**Helgi Abrahamsen**
landsstýrismaður

**Send við telduposti til als@als.fo**

**GG! Minnist til at goyma pdf-skjalið, áðrenn sent verður til Arbeiðsloysisskipanina.**